## DAGSINS MEINING

# Landsdansistevnan – eitt gott tiltak

Í vikuskiftinum, sum fór, var landsdansistevna í Havn, og fólk í hópatali vóru komin saman fyrst á Vaglinum, so í høllini á Nabbi og síðan varð dansað í Sjónleikarahúsinum til tann ljósa morgun. Hetta við at halda eina landsdansistevnu er eitt frálíkt tiltak.

Onkur kann kanska spyrja, hvønn týdning dansurin hevur á okkara døgum. Er hann ikki ein fornleivd? Hoyrir hann ikki fortíðini til? Hvat skal endamálið vera við at gera so nógv burtur úr føroyskum dansi?

Vit eru ikki í iva: dansurin hevur størri týdning enn nakrantíð áður. Dansurin er ein týðandi táttur í føroyskum samleika og dansurin eigur sín stóra lut í tí, at føroyskum málið var lív lagað, soleiðis sum eisini fleiri av røðarunum á stevnuni vístu á.

Stevnan er ein manifestatión av tí týdningi, ið føroyski dansurin enn hevur sum mentanartáttur. Hetta er sera gott, og tí halda vit, at landsdansistevnan hevur stóran týdning fyri føroyska mentan. Dansurin er ein partur av føroyskari mentan, og kvæðini, ið hoyra til dansin, eru okkara íkast til ein felags norðurlendskan mentanararv, eins og íslendsku fornsøgurnar eru íslendska íkastið. Hetta er ein av mongum orsøkum til, at vit eiga at halda lív í føroyska dansinum. Hann hevur ikki bert týdning fyri okkum, men fyri umheimin uttan fyri okkum. Dansurin er sum øllum kunnugt komin av meginandinum í miðøldini, og her er hann vorðin varðveittur, meðan hann er burturgloymdar í øllum øðrum londum.

Myndugleikarnir eiga at sýna dansinum ans og teir eiga at stuðla tí virksemi, sum verður avrikað í dansifeløgunum kring landið. Ein av røðarunum á stevnuni nevndi, at tað er dansifeløgunum fyri at takka, at dansinum er lív lagað. Hetta er so satt sum tað er sagt. Dansifeløgini hava gjørt og gera eitt stórt arbeiði fyri at varðveita føroyska dansin. Men tað trýtur við áhuganum hjá teimum ungu og næsta takið hjá dansifeløgunum eigur at vera eitt álvarsamt átak til tess at økja um áhugan fyri føroyskum dansi millum børn og ung.

**Sosialurin**

# Handilshjún halda gullbrúdleyp



Sunnudagin kundu hjúnini Esther og Eivind Petersen úr Oyndarfirði halda gullbrúdleyp. Tey giftust ung og Eivind hevur verið handilsmaður í Oyndarfirði, síðan hann var blaðungur.

Og sum handilsmaður í eini lítlari bygd, so er ein ikki hvør sum helst. Handilin er sjálvur miðdepulin, sjálvur krumtappurin, sum alt melir rundan um. Tað er í handlinum at fólk savnast, tað er í handlinum, at fólk tosa saman, tað er í handlinum at fólk samgleðast og ugga, tá ber í móti.

Eivind hevur sjálvur duga sera at luttikið í samskiftinum. Honum dámar at práta, at fortelja og so er hann forvitin eisini. Í Oyndarfirði er handilsmaðurin og postmaðurin forlongdi armurin hjá bløðunum. Tað sum bløðini ikki fáa við, tað verður tikið upp í handlinum og har verður tosað um veingjabrotnar gæs og um gráu, sum er lambsjúk. So at siga alt annað samskifti fer eisini fram í handlinum.

Í fyrstu atløgu tykist Eivind at vera ein bráður maður við lítlum toli. Men hyggur tú eftir livliga virkseminum í einum handli, so sær tú beinanvegin, at tað skal eitt jobstol til at vinna sær breyð á hendan hátt. Ein ævigur meldur av børnum, sum keypa fyri ein smápenga, ein telefon sum ringjur í tíð og ótíð, og fólk, sum spyrja um ditt og datt. Hevði hann so bara verið handilsmaður, men hann er alt annað, sjúkrakassi, SEV, røktingarmaður, hagastýri, klokkari og so víðari og samskifti í samband við hesi álitisstørv ganga eisini gjøgnum handilin, tí Eivind er onga aðrastaðni at hitta enn í handlinum.

Tey eiga fimm børn og tá hesi vóru floygd, so fór Esther sjálv í handilin. og tað eru longu nøkur ár síðan. Esther er eitt stillført og fryntligt menninkja og har tolið hjá Eivind bilar, tekur hennara við.

Seinastu 20 árini hava tey handlað í nýggjum handli,. Fyrr hildu tey til í gamla handlinum niðri í Hálvmørk. Hetta var ein sera hugnaligur handil og tung ábyrgd liggur á eigara og eftirkomarum, at hendan byggifrøðiliga perlan, við so søguligum veggjum, ikki fer fyri einki, nú hon hevur staðið í gott og væl hundrað ár og hevur verið vitni til at føroyingar reistu seg frá bóndasamfelag og til nútímans samfelagið í dag.

Esther og Eivind eru framvegis í handlinum hvønn einasta dag og tey síggja út sum unglingar eftir at hava lyft í felag seinastu 50 árini. Væl hevur akurin búnast og mong eru foldini. Heili 38 børn, barnabørn og ektafelagar vaktu tey sunnumorgunin við sangi uttanfyri teirra heim í Garðamørk og hálvt triðhundrað heiðraðu teimum í bygdarhúsinum í Leirvík seinni um kvøldið.

Og sum ein oyndfirðingur einaferð segði við Eivind: “Tú er ríkur Eivind, tí tú eigur konu og børn. Tann sum eigur slíkan fong er ríkur.” Hetta var ein einkjumaður í talaði.

Eivind hevur veirð klokkari í mong harrans ár og ikki altíð hevur verið unniligt at farið heim í kirkjuna í kølmyrkri á vetrartíð. Tað gav at býta einaferð Eivind var farin tíðliga at ringja. Tveir menn av Skálafjørðinum vóru í drykkjuørindum í Oyndarfirði hesa náttina og tá oyndfirðingar vóru avdottnir, vistu teir ikki rættuliga hvat til var at taka. Teir gingu uttan flutning og reikaðu í bygdini. So fór klokkan at ringja, og teir hugsaðu: “Har er fólk.” Hvat Eivind hevur hugsað hendan myrka vetrarmorgun, tá hann sær andlitið í einum langtgingnum drykkumanni koma upp gjøgnum lemmin á kirkjuloftinum, tað kunnu vit bert gita okkum.

Øll tey bestu ynskir tit bæði.

Heilsan

*Jústinus*





**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Samhugaverkfall okkara er lógligt

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Arbeiðarafelag*
*S&K-felagið*

Vit hava frætt, at FAG alment hevur lýst, at teir ikki meta samhugaverkfall okkara at vera lógligt.

FAG vísir her á sáttmálaáseting, sum skal forða okkum í at lýsa slíkt samhugaverkfall og at freistin skal eftir teirra tykki vera ov stutt.

Aftur her roynir FAG at reingja sannleikan, tí sáttmálaásetingin, sum teir vísa til fór úr gildi 1. mai 2001, og tí er eingin sáttmálaáseting um lýsing av verkfalli ella samhugaverkfalli.

Annars hevði henda sáttmálaáseting einki við samhugaverkfall at gera.

Viðvíkjandi fráboðarfreist okkara, so er henda freist mundani longri enn freistin, sum víst verður til í dóminum, sum nevndur varð og tí er tað beinleiðis skeivt at nýta henda dóm sum samanberingar-grundarlag.

Lýsingin frá FAG er uttan iva ein roynd at ræða limir okkara, men vit skulu gera púrasta greitt, at lýsing okkara um samhugaverkfall stendur við.

# FA og HAK fulla undirtøku

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
*Tórshavn, 18.05.2001*

Á fundunum í Kollafirði hósdagin og fríggjdagin fingu FA og HAK fulla undirtøku fyri framhaldandi og herdum tiltøkum

Tað var hugaligt hjá nevndunum í FA og HAK, á fundunum hósdagin og fríggjadagin, at hoyra allar fundarluttakararnar uttan undantak, taka undir við, at tiltøkini skulu halda áfram og herðast.

Samstundis tóku ein rúgva av limunum orði og setta fram harðar ábreiðslur móti løgregluni, sum saman við arbeiðsgevarunum hevur lagt seg út í arbeiðsstríð okkara.

Lógvabresturin dundi í fundarhølunum aftan á, at limirnir so dyggiliga høvdu sagt sína meining um framferðina hjá løgregluni, samstundis sum nevndirnar í feløgunum okkara fingu ein so dyggan stuðul, at tað hevur styrkt okkum í sannføring okkara um, at vit skulu halda áfram við stríði okkara til vit hava vunnið á mál.

Slík undirtøka, har limirnir vístu, at framferðin hjá løgregluni veruliga hevur kynt ein sannan stríðsanda hjá hesum limum okkara, sannførir okkum um, at vit í dag standa enn sterkari móti ráðagerðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

# Tíðindaskriv

Ungmannafelagið Samband tekur undir við verkfalsrættin hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Men Ungmannafelagið Samband finst harðliga at atfinningunum móti løgregluni, so sum fleiri fakfeløg og Javnaðarflokkurin eru komin við í samband ólógligar blokadur. Løgreglan skal hava rætt til at útinna sínar uppgávur, tá ólógligt virksemi verður framt.

Ungmannafelagið Samband viðurkennir annars demokratiska rættin hjá øllum fakfeløgum at fara í lógligt verkfall, so leingi sum lógir landsins verða hildnar.

**Nevndin í Ungmannafelagnum Samband**

# Takið ikki oljuna í land í Føroyum

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Um nakrar fáar mánaðir eru vit møguliga klókari, tá tað um framtíðar oljuvinnu í Føroyum ræður. Verður olja funnin skulu føroyskir myndugleikar til at taka støðu til, um oljan skal í land í Føroyum ella ikki. Kolvetnislógin sigur greitt, at øll olja skal í land í Føroyum. Er tað tó eitt politiskt ynski til ta tíð, at oljan kortini ikki skal í land her, so mugu undantak gerast til lógina. Og tá spurt verður hjá oljufeløgum og hjá grannum okkara, hetlendingum, hvat hesi meta um henda spurning, so er svarið greitt. Hetlendingar síggja fegnir, at føroyingar brúka risastóra oljuterminalin Sullom Voe, nú hann er tøkur til at taka ímóti føroyskari olju. Men eisini umboð fyri stór oljufeløg eru av hesi óskoðan.

Stjórin hjá BP fyri Atlantsmótið, Peter Rattey er samdur við tey, sum halda tað vera skeivt at taka oljuna í land í Føroyum, verða olja funnin her. - Spurningurin er, um føroyingar ynskja tað, um tit t.d. ynskja, at eitt nýtt Sullom Voe skal byggjast í Føroyum. Peter Rattey heldur sjálvur, at føroyingar áttu at umhugsað at brúkt Sullom Voe oljuterminalin í Hetlandi heldur enn at bygt ein slíkan terminal í Føroyum. –Men tá mugu føroyskir myndugleikar eisini tryggja sær, at teir fáa øll tey virði, sum teir eiga, skuldi oljan ikki komið í land í Føroyum men farið víðari til Hetlands leggur hann aftrat.

Sjálvur heldur hann ikki, at tað eigur at verða neyðugt at taka oljuna í land í Føroyum fyri at fáa optimalt burturúr. At byggja ein oljuterminal í Føroyum fer at hava nógvar óhepnar avleiðingar við sær. Og tað kann skjótt enda við sosialum og samfelagsligum trupulleikum.

# Lygusøgurnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
*Tórshavn, 17.05.2001*

Í útvarpinum í kvøld verður boðað frá, at Føroya Arbeiðsgevarafelag á heimasíðu sínari ger vart við, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag høvdu fingið ígjøgnum fleiri prinsipiel mál áðrenn samráðingarnar slitnaðu.

Nevnd verða málini um setanarskriv, avtalu um tøkni, frían búna og ásetingar um lærlingar.

Her fer FAG sum ikki eina ferð lætt um sannleikan, tí fyri tað fyrst, so vóru tað ikki FA og HAK, sum komu við uppskoti um setanarskriv, men FAG kom sjálvt við hesum uppskoti, so tað er beinleiðis villeiðandi, at geva fjølmiðlunum tað fatan, at FAG her hevur slaka fyri krøvum hjá fakfeløg-unum.

Tað er heldur ikki rætt, tá FAG sigur at teir hava eftirlíka krøvum okkara um avtalu um tøkni, frían búna og áseting um lærlingar, tí FAG vildi ikki góðtaka nøkur av teimum krøvum, sum feløg okkara settu fram hesum viðvíkjandi, men vildi hava sínar egnu orðingar og tað hava FA og HAK efturlíkað, so tað er ikki FAG sum hevur slakað her.

Tað er eisini skeivt, at Páll Nielsen hevur verið við at orða hesar semjur, tí tað er Bjørgfríð Ludvig sum einsamøll hevur gjørt orðingarnar. Allar orðingar vórðu gjørdar tá Páll Nielsen, sum umboðaði feløg okkara fekk hesar fyrilagdar.

Enn einaferð kunnu vit tí staðfesta, at FAG fer tilvildarliga um sannleikan, og ilt er ikki at síggja, at hetta er ein roynd at skava út yvir ráðagerðina, sum teir eru upprunin til, har alt land okkara varð sent út í verkfall bert tí FAG og eitt fakfelag royndu at niðurbinda feløg okkara til ikki at kunnu samráðst um sáttmálakrøv okkara, tí avtala varð gjørd millum FAG og hetta felag um, at feløg okkara ikki skuldu hava somu lønarhækking sum hetta felag.

Annars er her talan um ásetingar sum ikki kosta arbeiðsgevarunum ein krónu, so at gera hetta til nakað prinsielt er púrasta burtur úr vón og viti.

Alt tos um prosentir er uttanumtos, tí vit hava orðini hjá semingsmonnunum at halda okkum til, og teir søgdu ferð eftir ferð, at FAG ikki vildi tosa um annað enn part av tí semju, sum gjørd var við hini feløgini, og í hesari semju lá ein tilsøgn um, at FAG ikki skuldi geva feløgum okkara somu lønarhækking sum hini feløgini høvdu fingið. Hetta vísir muruna í teimum sum í dag mynda nevndian í FAG.


Sosialurin


†

Okkara góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**MARIUS RUBEKSEN**
**»Marius á posthúsinum«**

andaðist sunnumorgunin 20. mai, 79 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum, mikudagin kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

**Ruth, Borgny og Óli**